# Við bili at keypa – bil…?

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag – Ólavsøkuaftan:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og stundum regn, Seinnapartin eitt sindur minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið Ólavsøkudag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og regn, men seinnapartin sólglottar og kanska okkurt ælið. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mikudagin lækkar hann niður í sunnan og møguliga regn. Hitin millum 8 og 12 stig.

### Hóskvøldið rendi ein bilur við nógvari ferð beint í høvuðsdyrnar hjá Bilfríðkuni í Havn og gjørdi stóran skaða

ØRVITISKOYRING
*Eirikur Lindenskov*



*Stórur materiellur skaði stóðst. Hondabilurin, sum rendi á høvuðsdyrnar hjá Bilfríðkuni, fekk stóran skaða og kundi ikki koyra. Hurð og rútur hjá Bilfríðkuni fórui í knús, og bilar í sýnisglugganum vórðu skamfílaðir*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Bilasølurnar í Havn hava vanliga ikki opið til klokkan 22 á kvøldi. Tað hevði Bilfríðkan, sum selir merkini BMW og FIAT, heldur ikki hóskvøldið. Men kortini ætlaði ein maður sær inn á bilasøluna, hóast hurðin var læst – og tað við bili…

Soleiðis sá tað í øllum førum út, tá ein Honda Civic við nógvari ferð rendi lúkst í høvuðsdyrnar til bilasøluna hjá Bilfríðkuni.

– Eg hvakk við, og alt húsið skalv, sigur Ludvík Petersen, stjóri í Bilfríðkuni, sum var til arbeiðis hetta kvødlið.

– Vit sum selja bilar og liva av at rætta út buglur vilja sjálvandi hava arbeiði, men at teir beinleiðis koyra á framsýingargluggan hjá okkum, tað er nakað nógv av tí góða, segði Ludvík Petersen, tá Sosialurin hitti hann hóskvøldið, meðan hann var í ferð við at rudda træsprek og glassplintur upp av gólvinum.

Ein maður og kona, sum sóu tilburðin, søgdu við Sosialin, at maðurin í bilinum brádliga setti spitaran í botn og fór spolandi gjøgnum túnið hjá Bilfríðkuni fram við sýnisgluggan um. Helst varnaðist førarin ikki ein mótkoyrandi bil, og brátt rendi hann inn í hurðina.

Bilurin, sum rendi á, fekk rættuliga stóran skaða og kundi ikki koyra. Hurðin hjá Bilfríðkuni fór í knús, men tíbetur helt durastólpin so frætt, at vanlukkubilurin ikki slapp inn í handiln. Men onkrir bilar í sýnisgluggunum vórðu skamfílaðir av splintrunum.

Av politistøðini í Havn verður sagt, at maðurin í síni frágreiðing segði, at hann nýsti og kom at traðka á spitaran…


Brúdarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralið 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast

Radio-verkstaður
Umvæling av:
● Sjónvarpum
● Videotólum
● Hi-Fi
Vit umvæla:
PHILIPS
PANASONIC
SAMSUNG
og onnur merki
Fokus ELEKTRONIK
J. Bronckgøtu 34
Tlf. 311306 - Fax 311306


### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 12 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 14 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 20 |
| London | 24 |
| Tromsø | 13 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 27 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 32 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 14 |
| New York | 22 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 28 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 6 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1020 hPa. við Føroyar viknar. Eitt lágtrýst, 984 hPa. eystan fyri Hvarvið stendur mestsum í stað, men brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.




Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer eystureftir og brúgvalagið haðani gevur regn Ólavsøkumorgun.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/07 kl. 06⁰⁰– 27/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 26/07 kl. 06⁰⁰– 27/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 51,0 mm


Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT


## VESTFALLSKYRRINDI

4. august: Full sól
5. august: Mánin longst frá jørðini
12. august: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. juli | 01.46 | 14.22 | 00.46 | 13.22 | 01.01 | 13.37 | 03.46 | 16.22 | 04.46 | 17.22 | 00.01 | 12.37 | 11.37 | — | 02.01 | 14.37 | 03.01 | 15.37 | 01.31 | 14.07 | 02.46 | 15.22 |
| 29. juli | 02.59 | 15.23 | 01.59 | 14.23 | 02.14 | 14.38 | 04.59 | 17.23 | 05.59 | 18.23 | 01.14 | 13.38 | 00.14 | 12.38 | 03.14 | 15.38 | 04.14 | 16.38 | 02.44 | 15.08 | 03.59 | 16.23 |
| 30. juli | 03.48 | 16.12 | 02.48 | 15.12 | 03.03 | 15.27 | 05.48 | 18.12 | 06.48 | 19.12 | 02.03 | 14.27 | 01.03 | 13.27 | 04.03 | 16.27 | 05.03 | 17.27 | 03.33 | 15.57 | 04.48 | 17.12 |
| 31. juli | 04.36 | 17.02 | 03.36 | 16.02 | 03.51 | 16.17 | 06.36 | 19.02 | 07.36 | 20.02 | 02.51 | 15.17 | 01.51 | 14.17 | 04.51 | 17.17 | 05.51 | 18.17 | 04.21 | 16.47 | 05.36 | 18.02 |